gult16 cyan16 magenta16 svart16



# Íslendski forsetin er komin til Føroya

**Um hálvgum tólv tíðina hósdagin lendi íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, við fylgi í Vágum, har løgmaður tók ímóti. Á middegi vitjaði forsetin borgarstjóran í Havn og fór síðani til almenna móttøku hjá løgmanni í Tinganesi**

FORSETAVITJAN
*John Johannessen*
*Jens Kristian Vang (myndir)*



Eftir tjúkkan mjørka í fleiri dagar vísti føroyska summarveðrið seg frá síni frægu síðu, tá íslendski forsetin við fylgi um hálvgum tólv tíðina hósdagin lendi í Vágum.

Sambært skránni, skuldi forsetin lenda í Vágum við íslendskum sjóverjuflogfari klokkan trý korter til ellivu. Men orsakað av nógvum mjørka í Reykjavík slapp forsetin ikki á flog til tíðina, og bleiv tí eitt sindur seinkaður.

### Almenn vitjan

Íslendski forsetin er komin til Føroya á almenna vitjan í tríggjar dagar eftir innbjóðan frá Anfinni Kallsberg, løgmanni.

Á flogvøllinum í Vágum var stórt alment móttøkulið fyri forsetanum. Anfinn Kallsberg, løgmaður, tók ímóti saman við Vibeke Larsen, ríkisumboðsmanni, Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóra, Flemming Mørch, sendiharra Danmarkar, Helga Águstssyni, sendiharra Íslands, Majken S. Poulsen, protokollfulltrúa, Jónhild Jørgensen, formanni fyri felagskommununa í Vágum, Eivini Jacobsen, borgarstjóra fyri Sørvágs kommunu og Finnboga Niclassen, flogvallarovasta.

### Spákaðu í høvuðsstaðnum

Eftir stuttu móttøkuna á flogvøllinum í Vágum, fóru løgmaður og forsetin við fylgi til Havnar við tyrlu. Síðani koyrdi fylgið frá tyrlupallinum á Boðanesi niðan í gamla Kommunuskúlagarðin, har Jan Christiansen, borgarstjóri, tók ímóti, og dóttir borgarstjórans, Minna Christiansen, handaði forsetafrúuni, frú Mousaieff, blómutyssi.

Eftir at forsetin hevði heilsað upp á allar býráðslimirnar og fingið gávu frá Jan Christiansen, borgarstjóra, fór fylgið gongutúr við Jan Christiansen og forsetanum frá Vaglinum fram við Bojsensgarði oman á Bryggjubakka, gjøgnum Bringsnagøtu og Reynagøtu í gamla býlinginum á Reyni og út í Tinganes til móttøku hjá løgmanni.

Eftir móttøkuna og stuttan tíðindafund, tók løgtingsformaðurin, Finnbogi Ísakson, við sum vertur eina løtu. Løgtingsformaðurin vísti forsetanum Tinganes og fylgdi honum síðani eftir Müllersbrúgv, gjøgnum Gongina og niðan á Hafnia til búgvið morgunmatarborð.

### Heilsar upp á íslendingar

Tá Sosialurin fór til prentingar í gjár, var forsetin enn ikki setstur við morgunmatarborðið. Men samkvæmt skránni skuldi hann eftir morgunmatarborðið á Hotel Føroyar at hvíla seg eina løtu, og síðani í Norðurlandahúsið, har hann skuldi heilsa upp á íslendingar í Føroyum.

Eftir móttøkuna á Hotel Føroyum, skuldi Íslendski forsetin til døgurða í Roykstovuni í Kirkjubø, har løgmaður var vertur.

Fríggjadagin skal íslendski forsetin vitja á Skálafjørðinum, Í Gøtu og í Norðoyggjum. Leygardagin gongur leiðin vestureftir, til Mykinesar, og síðani til mentanarkvøld í Miðvági, har Óli Holm, landsstýrismaður er vertur. Seinni leygarkvøldið fer forsetin avstað aftur til Íslands.

# Løgmaður fegnast um vitjanina

FORSETAVITJAN
*Jan Müller*

-Tað er so avgjørt uppá tíðina, at vit taka ímóti einum íslendskum forseta sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum er sera fegin um, at íslendski forsetin hevur givið sær stundir at vitja Føroyar. –Vónandi kann henda vitjanin vera við til at styrkja bondini millum londini, sum annars eru sera sterk sum er.

Tað eru longu farin nógv ár, síðani fyrrverandi íslendski forsetin vitjaði Føroyum, og tí er henda vitjan sera kærkomin sigur løgmaður. Hann vísir á, at ein líkandi stór vitjan enn stendur á skránni, og tað er norski kongurin, sum er boðin at vitja í Føroyum, fyrst av Edmundi Joensen, táverandi løgmanni og í fjør av Anfinni Kallsberg, løgmanni, tá hann var í Norra á almennari vitjan. Tað er so óvíst, nær norski kongurin vitjar.

Løgmaður vísir aftur øllum spekulatiónum, nú fleiri íslendskir lykilpersónar vitja Føroyar, um at hetta hevur nakað at gera við royndirnar hjá føroyingum at gerast fullveldi. –Tað málið er millum okkum og danir og ongan annan. –Íslendskir ráðharrar og forseti eru okkara gestir og tað snýr seg um at menna bondini millum hesar báðar grannatjóðir leggur løgmaður aftrat.





gult17 cyan17 magenta17 svart17

# Onnur forsetavitjanin í søguni

*Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn tekur móti íslendska forsetanum.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



**Ólafur Ragnar Grímsson er annar forsetin í søguni, sum vitjar Føroyar. Fyrsti forsetin vitjaði í 1987, og var eisini íslendingur**

FORSETAVITJAN
*John Johannessen*

Vitjan Ólafs Ragnar Grímssonar, forseta íslands, er onnur forsetavitjanin í Føroya søgu. Og harafturat er tað aðru ferð, at íslendskur forseti vitjar.

Fyrstu ferð, ein forseti vitjaði í Føroyum, var í september 1987. Forsetin tá var Vígdis Finnbogadóttir, sum sat sum forseti í Íslandi í 16 ár. Og nú knøpp 14 ár seini vitjar Ólafur Ragnar Grímsson, sum er fimti forseti íslands og hevur verið forseti í Íslandi fimm ár.

Men onkur annar forseti hevur kortini óalment vitjað í Føroyum í síni forsetatíð. Símun Eldjarn, sum var forseti Íslands áðrenn Vígdis Finnbogadóttir, var okkurt summarið í summarfrí í Føroyum. Men vitjan hansara varð ikki roknað sum almenn vitjan.

# Vil hitta fólkið

FORSETAVITJAN
*John Johannessen*

Sambært Løgmansskrivstovuni, hevur íslendski forsetin ynskt at vera saman við vanliga fólkinum á vitjanini í Føroyum.

Tí hevur Løgmansskrivstovan lagt vitjanina soleiðis til rættis, at forsetin sleppur kring oyggjarnar, og at hann kemur í samband við vanlig fólk, í staðin fyri bert politikarar og embætismenn.

Hetta sæst millum annað á skránni fyri vitjanina í Klaksvík, har forsetin hevur ynskt, at Brimil skal leggja at við Kósabrúnna, so hann kemur millum fólkið, ið starvast á brúnni og á Kósavirkinum.



*Nógv børn vóru komin at hyggja eftir forsetanum, hvørs vitjan er einki minni enn ein kongavitjan.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Mátti fáa loyvi frá drotningini



*Íslendski forsetin og frú.*

*Mynd Jens Kr. Vang*

**Ein forsetavitjan hevur sama tingarstig, sum tá drotningin vitjar Føroyar. Løgmaður hevur ikki loyvi at vera vertur til slíka vitjan, uttan hann er umboð í drotningarnar stað**

FORSETAVITJAN
*John Johannessen*

Løgmaður mátti biðja um loyvi frá drotningini, áðrenn hann kundi bjóða seg fram sum vert fyri vitjan forseta Íslands í Føroyum.

Vitjanin hjá Ólafi Ragnar Grímsson, forseta, er á hægsta tingnarstigi. Tað vil siga, at hon er á sama tignarstigi, sum ein konga ella drotningavitjan.

Men løgmaður hevur ikki so høga tign, og kann tí ikki vera vertur, uttan hann er vertur í drotningarnar stað.

Av tí, at Føroyar eru í ríkisfelagsskapi við Danmark, er tað Margreta drotning, ið hevur hægstu tign í landinum, meðan løgmaður hevur somu tign, sum ein forsætisráðharri í øðrum londum.

Íslendski forsetin hevur somu tign, sum drotningin. Tí er tað drotningin, ið formliga eigur at vera vertur fyri almennari forsetavitjan í Føroyum. Og tí mátti løgmaður umvegis Ríkisumboðið fáa loyvi frá Margretu drotning til at vera umboð í hennara stað, nú íslendski forsetin kom á vitjan.